TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 07.11.2024 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Eyð Jóna Eidesgaard

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 68/24 | 24/00248-1 | Fíggjarætlan 2025 |
| 69/24 | 24/00283-3 | BVT -Barnaverndartænastan -eykajáttan 2024 |
| 70/24 | 24/00291-2 | Mýrifípan -foreldraráðið |
| **Til kunningar** | | |
| 22/24 | 24/00275-2 | Tøkugjøld 2024 |
| 23/24 | 24/00004-1 | Skattatøl 2024 |
| 24/24 | 24/00036-2 | Umsókn um broyting av byggisamtikt fyri matr. nr 16 á Sevmýri |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna til býráðsfundin í dag 7. november 2024 og spyr um viðmerkingar eru til hesa –ongin viðmerking.

**Til støðutakan**

## 68/24
## 24/00248-1 Fíggjarætlan 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.09.2024 | 49/24 |
| 2 Býráðið | 26.09.2024 | 59/24 |
| 3 Vinnu- og havnanevndin | 21.10.2024 | 37/24 |
| 4 Tekniska nevnd | 21.10.2024 | 43/24 |
| 5 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | | |
| 6 Sosiala nevnd | 17.10.2024 | 24/24 |
| 7 Mentanarnevndin | 21.10.2024 | 58/24 |
| 8 Fíggjarnevndin | 31.10.2024 | 68/24 |
| 9 Býráðið | 07.11.2024 | 68/24 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 14.09.20243)**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Býráðið hevur fyrstu viðgerð 26. september og aðru viðger áðrenn 1. Desember 2024. november.

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum til fíggjarætlan 2025 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 20,9% og 8.000 kr.

Fortreytirnar í uppskotinum eru, at rakstrarútreiðslur kunnu bert hækka, um talan er um:
- Lógarkrøv.
- býráðssamtyktir íroknað virksemisbroytingar, sum fylgja av nýggjum íløgum.
- sáttmálabroytingar og líknandi.

Mælt verður til at Fíggjarætlan “FÆ2025” verður viðgjørd av Tvøroyrar býráð sum niðanfyri:
- 26. september, 1. viðgerð av fíggjarætlan “FÆ2025”, har ásett verður barnafrádráttur, skattaprosent, rakstar og íløguætlanir fyri 2025.
- Áðrenn 1. desember 2024, 2. viðgerð og endalig viðgerð av ”FÆ2025”

**Lyklatøl**
Samb. Fráboðan frá TAKS, eru skattainntøkur fyri 2025 mettar at blíva: **kr. 72.996.177,-**

Inntøkugrundarlagið er grunda á:

- Kommunuskattur 20,9%
- Barnafrádráttur kr. -8.000,-

**Skattagrundarlag:**

| | | |
|---|---|---|
| A-inntøka: | *377.298.700,-* | |
| B-Inntøka: | *21.424.900,-* | **398.719.600** |
| FAS-Inntøka: | *(-6.315.634,-)* | |
| Inntøkufrádr.: | *(-904.521,-)* | |
| Sjófrádr.: | *(-1.449.928,-)* | **(-8.670.083,-)** |
| Botnfrádráttur: | *(-40.785.511,-)* | **(-40.785.511,-)** |
| **Kommunalt skattagrundarlag** | | **349.264.007,-** |
| Komm.skatt: (20,9%) | ***72.996.177,-*** | |
| Barnafrádráttur: (386 x 8.000,-) | *(-3.088.000,-)* | **69.908.177,-** |

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

- *Samb. løgtingslóg um kommunustýri er ásett í § 39, at fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.*
    - *Stk. 2. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.* ***Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember****.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** Fíggjarætlan fyri 2025

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 24. september 2024:**
Einmælt samtykt at áseta kommunuskattin til 20,9% og barnafrádráttin til kr. -8.000,- fyri fíggjarárið 2025. Fíggjarnevndin mælir til, at býráðið kemur saman í viku 43 at viðgerða rakstrar- og løguætlan fyri fíggjarárið 2025.

**Býráðið 26. september 2024:**
Einmælt samtykt fyrstu viðgerð av fíggjarætlan fyri 2025, og áseta kommunuskattin til 20,9% og barnafrádráttin til kr. -8.000,-.

**Kommunustjorin 30. september 2024:**
Kommunustjórin mælir til, at nevndirnar viðgerða og umrøða fyriliggjandi viðmerkingar og ynskir til fíggjarætlanina 2025 frá deldinum og starvsfólkum hjá kommununi, ið eftirfylgjandi verða tikin til endaliga støðutakan, tá alt býráði er samla til felags arbeiðsdag við fíggjarætlanini fyri 2025.

**Tekniskileiðarin dagf. 1.10.2024:**
Tekinski leiðarin mælir til at nevndin viðgerð innkomni ynskir og tilmælir frá deildum av rakstri og íløgum 2025.

**Sosiala nevnd 17. oktober 2024:**
Nevndin er kunna og hevur umrøtt ynskir til fíggjarætlan 2025 fyri barnaansingsøkið hjá Tvøroyrar kommunu og BVT, Barnaverndartænastuna fyri Suðuroynna. Nevndin tekur endaliga støðu til fíggjarætlan fyri 2025 á býráðsfundinum 31. oktober 2024, tá onnur viðgerð av fíggjarætlan fyri 2025 verður endaliga viðgjørd og samtykt av býráðnum.

**Mentanarnevndin 21. oktober 2024:**
Nevndin er kunna og hevur umrøtt ynskir til fíggjarætlan 2025. Nevndin umrøddi viðurskiftir kring skúlaøkið. Nevndin tekur endaliga støðu til fíggjarætlan fyri 2025 á býráðsfundinum 31. oktober 2024, tá onnur viðgerð av fíggjarætlan fyri 2025 verður endaliga viðgjørd og samtykt av býráðnum.

**Vinnu- og havnanevndin 21. oktober 2024:**
Nevndin er kunna og hevur umrøtt ynskir til fíggjarætlanina fyri 2025. Nevndin umrøddi viðurskifti í sambandi við havnaøkið í kommununi. Nevndin tekur endaliga støðu til fíggjarætlan fyri 2025 á býráðsfundinum 31. oktober 2024, tá onnur viðgerð av fíggjarætlan fyri 2025 verður endaliga viðgjørd og samtykt av býráðnum.
Ynski frá nevndini er at seta 1 mió av á FÆ25 til ábøtur av dekkinum á bingjuplássinum á keiini. Nevndin mælir eisini til, at 5 mió kr verða settar av á FÆ25 til liðugtgerð av keihylinum og at umvæla keiøkið eystanfyri Delta Seafood.

**Tekniska nevnd 21. oktober 2024:**
Nevndin er kunnað og hevur umrøtt ynskir til fíggjarætlanina fyri 2025. Nevndin umrøddi viðurskifti í sambandi við tekniska økið í kommununi. Nevndin tekur endaliga støðu til fíggjarætlan fyri 2025 á býráðsfundinum 31. oktober 2024, tá onnur viðgerð av fíggjarætlan fyri 2025 verður endaliga viðgjørd og samtykt av býráðnum.

**Kommunustjórin 24. oktober 2024:**
Á temadagi 23. okt. har allir býráðslimir saman við kommunustjóra, fíggjarleiðara og leiðara av tekniskudeild og starvsfólkum í umsitingini, bleiv fíggjarætlanin hjá Tvøroyrar kommunu 2025 viðgjørd.

Viðgerðin tók støðið í samtyktini á býráðsfundinum 26. september 2024, har karmarnir fyri inntøkumetingar, skattaprosent og frádráttir vóru lagdir sum grundarlag fyri rakstur og íløgur fyri 2025, umframt tilfar við tilmælum frá stovns- og deildarleiðarum hjá Tvøroyrar kommunu.

Á temadøgum var semja um, at skattaprosentið verður eins og undanfarna ár, 20,9%. At Barnafrádrátturin framhaldandi verður kr. 8.000,-. At hildið verður áfram við at lata virðiskort á kr. 2.000, til øll børn í Tvøroyrar kommunu, ið kunna brúka sum ískoyti til luttøku til mentan- og ítróttar tiltøk.

Á temadøgunum var semja um at avseta kr. 33,8 mió til íløgur 2025, í mun til 29,8 mió 2024, og at avsett til rakstur kr. 88,5 míó. í mun til 90,3 í 2024.

At barnaansingargjaldið verður framhaldandi tað sama fyri vøggustovu- og barnagarðspláss kr./mnd. 1.900,-, annað barnið kr./mnd. 1.600,- og ókeypis fyri triðja barni og hareftir. Gjaldið fyri fyrsta barni í frítíðarskúlanum verður framhaldandi kr. 1.200,-/mðr., og goldið verður fyri 11 mðr. Forskúlagjøldini verða tey somu, tvs. fyri fyrsta barni verður goldið kr. 700,-/mðr. og goldið verður fyri 11 mðr. Avsláttur verður latin javnbjóðis galdandi avsláttarskipan fyri barnaansingina.

Inntøkurnar av persónsskatti 2025 eru mettar til kr. 69.9 mió, samanborði við metingina fyri 2024, á kr. 66,0 mió. Inntøkur av partafelagsskatti verða mettar til kr. 2,5 mió.

**Rakstur 2024/2025:**

| | FÆ2024 Rakstur | FÆ2025 Rakstur | Munur |
|---|---|---|---|
| **§1 -Kommunala fyrisitingin** | 10.854.411 | 12.093.660 | 1.239.249 |
| **§2 -Almanna- & heilsumál** | 33.467.986 | 36.265.823 | 2.797.837 |
| **§3 -Børn & ung** | 16.921.767 | 17.110.864 | 189.097 |
| **§4 -Undirvísing** | 8.630.424 | 8.885.844 | 255.420 |
| **§5 -Mentan & frítíð** | 10.400.142 | 10.627.013 | 226.872 |
| **§6 -Teknisk mál** | 7.072.869 | 5.582.231 | -1.490.638 |
| **§6 -Teknisk mál** | -1.000.000 | -5.950.000 | -4.950.000 |
| **§7 -Kommunal virki** | 3.933.600 | 3.928.093 | -5.507 |
| | 90.281.199 | 88.543.528 | -1.737.671 |

**Íløgur ætlanin 2024/2025:**

| | FÆ2024 Íløgur | FÆ2025 Íløgur | Munur |
|---|---|---|---|
| **§1 -Kommunala fyrisitingin** | 850.000 | 1.150.000 | 300.000 |
| **§2 -Almanna- & heilsumál** | | 200.000 | 200.000 |
| **§3 -Børn & ung** | 800.000 | 5.150.000 | 4.350.000 |
| **§4 -Undirvísing** | 2.405.000 | 7.182.700 | 4.777.700 |
| **§5 -Mentan & frítíð** | 895.000 | 230.000 | -665.000 |
| **§6 -Teknisk mál** | 19.605.000 | 15.900.000 | -3.705.000 |
| **§7 -Kommunal virki** | 5.425.000 | 4.015.000 | -1.410.000 |
| | 29.980.000 | 33.827.700 | 3.847.700 |

**Avseting til íløgur 2025: (Greining)**

| | | | 2025 |
|---|---|---|---|
| 115 | Kommunufyrisitingin íløgur | | 850.000 |
| 119 | Tekniska deild | Fyrisiting | 100.000 |
| 123 | Kunningarstovan | | 200.000 |
| 215 | Tannrøkt | | 200.000 |
| 311 | Íløga Barnagarðurin og fr.skúla | | 5.150.000 |
| | Spælipláss | Froðba | 0 |
| 411 | Íløga skúlin | | 7.182.700 |
| 515 | Jólaprýði | | 100.000 |
| 533 | Íløga Ítróttarhøllin og vøllurin | | 130.000 |
| 609 | Bygning og løguframleiðsla: Bygningar | | 2.350.000 |
| 615 | Bygging og løguframleiðsla: Fríðkan | | 200.000 |
| 633 | Bygging og løguframleiðsla: Viðalundir | | 150.000 |
| 623 | Bygging og løguframleiðsla: Spillvatnsætlanir | | 4.000.000 |
| 625 | Bygging og løguframleiðsla: Vegir | | 1.500.000 |
| 619 | Bygging og løguframleiðsla: Kirkjugarður | | 5.000.000 |
| 621 | Vatnverkið | | 2.000.000 |
| 629 | Maskinur og bilar | | 0 |
| 627 | Gøtuljós | | 700.000 |
| 715 | Bygging og løguframleiðsla Tilbúgving & bruna | | 285.000 |
| 719 | Íløga Tvøroyrar Havn | | 480.000 |
| 721 | Íløga bátahavnin | | 3.250.000 |
| | **Íløgur íalt 2025** | | **33.827.700** |

**Fíggjarætlanin 2025 javnvigar við eina álíkning á 0,61**

**Tilmælið 24.10.2024:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið umvegis fíggjarnevndina, býráðnum til aðru og endaligu viðgerð og samtykt.

**Fíggjarnevndin 31. oktober 2024:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan 2025. -málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 07. november 2024:**
Tvøroyrar býráðið tekur einmælt undir við fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan 2025, ið verður einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**69/24**
**24/00283-3 BVT -Barnaverndartænastan -eykajáttan 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 17.10.2024 | 25/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 31.10.2024 | 62/24 |
| 3 Býráðið | | |
| 4 Býráðið | 07.11.2024 | 69/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 13. Oktober 2024**
Umsitingin hevur móttikið teldupost frá leiðaranum av Barnaverndartænastuni fyri Suðuroy, ið boðar frá, at BVT tørvar eykajáttan til raksturin 2024. Við teldupostinum er frágreiðing til um virksemið hjá BVT, orsøkina til tørv á eykajáttan fyri 2024 við yvirlit av kostnaðar býtinum fyri hvørja kommunu sær í Suðuroynni.

Tvøroyrar kommuna veitur 38,34% av kostnaðinum av BVT, svarandi til kr. 148.612,- av eykajáttanini fyri 2024.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 26. mars 2021 (Barnaverndarlógin)

**Fíggjarligar avleiðingar:** Eykajáttan fyri FÆ2024

- *TVK hevur samlaða játtan á kr. 3,359 mió. til BVT í FÆ2024 samsvarandi 38,34% av rakstrinum fyri BVT (Býtislykilin er eftir fólkatalinum)*

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Sosialunevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 17. oktober 2024:**
Sosiala nevnd mælir einmælt til at veita eykajáttan til Barnaverndartænastuna, samsvarandi frágreiðing frá leiðaranum av barnaverndini og samb. viðgerð á stýrisfundi 10. oktober 2024. Mælt verður til at játtanin verður veitt av innistandandi. -Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 31. oktober 2024:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá sosialu nevnd at veita eykajáttan til Barnaverndartænastuna, samsvarandi frágreiðing frá leiðaranum av barnaverndini og samb. viðgerð á stýrisfundi 10. oktober 2024. Mælt verður til at játtanin verður veitt av innistandandi. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 07. november 2024:**
Býráðið tekur einmælt undir við tilmælinum hjá sosialu nevnd og fíggjarnevndini at veita eykajáttan til BVT Barnaverndartænastuna. Málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**70/24**
**24/00291-2 Mýrifípan -foreldraráðið**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 17.10.2024 | 28/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 31.10.2024 | 63/24 |
| 3 Býráðið | 07.11.2024 | 70/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 16.10.2024**
Umsitingin hevur orða uppskot til viðtøkur fyri foreldraráðið fyri barnaansingina hjá Tvøroyrar kommunu.

**Lógargrundarlag:** Sambært Løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018, §9. *Fyri hvønn dagstovn og hvørja dagrøktarskipan, tó ikki sjálvsognarstovnar, skal veljast eitt foreldraráð, sum gevur leiðaranum ráð og vegleiðing. Ráðið skal arbeiða fyri at bøta og styrkja um samstarvið ímillum foreldrini, stovnin og kommununa.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialunevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 17. oktober 2024:**
Sosiala nevnd mælir einmælt til at samtykkja fyriliggjandi uppskot til viðtøkur fyri foreldraráðið. -málið verður beint í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 31. oktober 2024:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá Sosialu nevnd, við tilmælið um, at §3 Foreldraráðslimir *«Í ráðið kunnu veljast millum øll foreldur, ið hava børn í barnaansingini hjá Tvøroyrar kommunu»* Verður broytt til, at foreldur at børnum í forskúlanum eisini kunna veljast, sum limir í foreldraráðið» -málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 07. november 2024:**
Býráðið tekur einmælt undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini um reglugerð fyri foreldraráðið.

**Til kunningar**

## 22/24
## 24/00275-2 Tøkugjøld 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 31.10.2024 | 12/24 |
| 2 Býráðið | 07.11.2024 | 22/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 07.10.2024**
Til kunning og umrøðu tøkugjøld 2024

**Lógargrundarlag:** Kunngerð nr. 168 frá 20. desember 2023 um býti av inntøkum frá veiðugjaldi og tøkugjaldi millum kommunurnar

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2024/25

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Fíggjarnevndin 31. oktober 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 07. november 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**23/24**
**24/00004-1 Skattatøl 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 2/24 |
| 2 Býráðið | 29.02.2024 | 4/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2024 | 5/24 |
| 4 Býráðið | 25.03.2024 | 9/24 |
| 5 Fíggjarnevndin | 03.05.2024 | 8/24 |
| 6 Býráðið | 06.05.2024 | 13/24 |
| 7 Fíggjarnevndin | 06.06.2024 | 9/24 |
| 8 Býráðið | 06.06.2024 | 14/24 |
| 9 Býráðið | 17.07.2024 | 18/24 |
| 10 Býráðið | 26.09.2024 | 21/24 |
| 11 Fíggjarnevndin | 31.10.2024 | 13/24 |
| 12 Býráðið | 07.11.2024 | 23/24 |
| 13 Býráðið | | |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.02.2024**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2023/2024

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2024/2025

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 06. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 17. juli 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 26. september 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 31. oktober 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 07. november 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

## 24/24
## 24/00036-2 Umsókn um broyting av byggisamtykt fyri matr. nr 16 á Sevmýri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.02.2024 | 6/24 |
| 2 Býráðið | 25.03.2024 | 14/24 |
| 3 Býráðið | 07.11.2024 | 24/24 |

**Málslýsing:**
Umsókn um broyting av verandi byggisamtykt fyri matr. nr. 16 á Sevmýri, Froðba
Núverandi eigari av økinum Sp/F 01.07.2019 ynskir, at Frítíðarøki F verður broytt til Miðstaðarøki A

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Tekniska nevnd 07. februar 2024:**
Nevndin mælir til at broyta byggisamtyktina fyri økið til Miðstaðarøki A.
Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá tekniskunevnd at broyta byggisamtyktina fyri matr.nr. 16. á Sevmýri frá verandi Frítíðarøki «F» til ístaðin Miðstaðarøki «A».

**Kommunustjórin 29.10.2024:**
Hervið verður sagt frá, at Tvøroyrar kommuna hevur móttikið góðkenningarskriv dagf. 21. okt. 2024 av broyting av byggisamtykt fyri matr. nr. 16 í Froðba, Sevmýri, -*samsv. býráðsamtykt 25. mars 2024*-, har Umhvørvismálaráðið boðar frá, at við heimild í §4 í býarskipanarlógini góðkennir broytingina í byggisamtyktini fyri matr.nr. 16 á Tvøroyri, soleiðis sum kommunan hevur søkt um, við tilvísing til viðmerkingina hjá býarskipanarnevndini. *«ikki er nágreinað í almennu byggisamtyktini fyri A: Miðstaðarøki, hvussu stór grundstykkini skulu vera í øki A»*

Boðast skal frá, at omanfyri nevnda broyting í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu er almenna kunngjørd á heimasíðuni hjá Tvøroyrar kommunu hin 25. okt. 2024.

**Býráðið 07. november 2024:**
Málið var kunnað og tikið til eftirtektar.

Fundurin lokin kl. 17:45

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Eyð Jóna Eidesgaard